# FYLGISKJAL 1 - KRØV TIL UNDANGÓÐKENNING

## KRØV TIL UNDANGÓÐKENNING

Her verða lýst tey krøv, sum veitarar, ið ynskja undangóðkenning, skulu lúka.

Veitarar, sum ynskja undangóðkenning, skulu við telduposti til danjalph@us.fo svara fylgjandi spurningum:

1. Hevur fyritøkan fíggjarligt grundarlag til at fremja uppgávuna?
2. Hevur fyritøkan skuld til tað almenna?
3. Hevur fyritøkan framt líknandi uppgávur?

Spurningar og krøv til skjalprógving eru nærri útgreinaðir niðanfyri.

## 1.1 HEVUR FYRITØKAN FÍGGJARLIGT GRUNDARLAG TIL AT FREMJA UPPGÁVUNA?

At standa fyri talgilding av tinglýsingar- og matrikularkivunum krevur, at veitarin er fíggjarliga somikið væl fyri, at eingin ivi er um, at veitarin hevur fíggjarliga orku at yvirhalda sáttmálan, og at veitarin er virkin á marknaðinum framyvir og kann veita support.

Sum skjalprógvan skal veitaran framleggja:

1. roknskapartøl fyri 2015 – 2017 og fíggjarútlit fyri komandi árini.
2. hvørjar ætlanir veitarin hevur, sum eru viðkomandi fyri samstarvið við Talgildu Føroyar.

## 1.2 HEVUR FYRITØKAN SKULD TIL TAÐ ALMENNA?

Fyritøkan skal vátta - við undirskrift frá persóni við heimild at binda fyritøkuna - at fyritøkan ikki stendur í skuld til tað almenna.

## 1.3 HEVUR FYRITØKAN FRAMT LÍKNANDI UPPGÁVUR?

Veitarin, sum bjóðar seg fram, skal hava royndir við uppgávum, sum í vavi og slagi minna um talgilding av tinglýsingar- og matrikularkivunum.

Sum skjalprógv **skal** veitarin vísa á:

- Lýsing av trimum teimum mest viðkomandi talgildingaruppgávunum, ið veitarin hevur framt seinastu trý árini.
- Veitarin skal fyri hvørja tilvísing upplýsa:
    - Vavið, innihald og møguligar serstakar avbjóðingar við veitingini
    - Tiðarskeiðið, tá uppgávan varð framd (byrjanar- og endadagur)
    - Um fyritøkan hevur nýtt undirveitarar, hvørjir hesir eru og hvønn part av veitingini hesir hava havt ábyrgd av
    - Hvør KT-skjalahandfaringarskipan varð nýtt, og hvar skipanin verður hýst
    - Sáttmálaupphæddin
    - Navn á kunda
    - Kontaktpersón hjá kundanum (navn, tlf.nr., teldupost)

Veitarin **kann** eisini vísa á líknandi veitingar, ið ganga longur enn trý ár aftur í tíðina, um hesar tykjast serliga viðkomandi, t.d. tilvísingar til uppgávur innan tinglýsingar-, matrikul- og byggisaksarkiv.

# TÍÐARÆTLAN OG FREISTIR

| Dagfesting | Hending |
|---|---|
| 6. mars 2018 | Tilfar lagt út á Keypsportalin |
| 13. mars 2018 | Kunningarfundur um útboðið kl. 14 – 16 á Umhvørvisstovuni, Traðargøta 38, Argir |
| 16. mars 2018 kl. 12 | Freist hjá veitarum at boða frá, at hann **ætlar** at søkja um undangóðkenning |
| 28. mars 2018 kl. 12 | Freist hjá veitarum at seta spurningar um undangóðkenningartilfarið |
| 11. apríl 2018 kl. 12 | Freist hjá veitarum at søkja um undangóðkenning |
| 17. apríl 2018 | Talgildu Føroyar at boðar frá, hvørjir veitarar er undangóðkendir |
| 18. apríl 2018 | Talgildu Føroyar útflýggja útbjóðingartilfar við nágreiniligum krøvum til veitingina |
| 9. mai 2018 kl. 12 | Freist hjá undangóðkendum veitarum at seta spurningar um útbjóðingartilfarið |
| 18. mai 2018 kl. 12 | Freist hjá undangóðkendum veitarum at lata inn tilboð upp á veitingina |
| 28. mai 2018 | Vinnandi tilboð kunngjørt tilboðsgevarum |
| 28. mai - 1. juni 2018 | Sáttmálasamráðingar og undirskrift |